# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kós bakborð

Tjóðveldi hevur hildið floksting í Skálavík og gamla søguríka bygdin hevur verið íblásandi karmur um eitt sermerkt floksting. Formansfrágreiðingin er í hvussu so er væl frágingin. Formaður Tjóveldis er tikin úr leikum sum røðari, og røðan á Keldu leygardagin man vera millum bestu røður hansara og samstundis ein hin besta politiska røða, hildin av tí ættarliði, sum tók við eftir stóru kreppuna í nítiárunum.

Røðan er visjoner, skaldaborin, í støðum ikki sørt Obamakend, við lokalum so væl sum altjóða tilsipingum, sum mugu nema við ikki bert hjørtuni á skálvíksingum men á einumhvørjum, sum lesur røðuna uttan mun til flokspolitiskt tilknýti annars. Einum kemur til hugs orðini hjá Finnboga Ísaksson, sála, á Vaglinum, tað minniliga kvøldið, tá ið landsliðið kom aftur úr Landskrona: "Í kvøld eru allir føroyingar tjóðveldismenn". Retorikkinum bilar ikki, og bert tíðin kann vísa, hvørt røðan, sum idelogiskt og tjóðskaparliga flytir mørk, eisini megnar at flyta atkvøður og undirtøku, ella um alt framvegis verður sum higartil í politikki.

Samstundis, sum røðan er háfloygd og prinsipiel er hon er sera ítøkilig, har sum ein slík frágreiðing skal vera ítøkilig. Røðan strikar mørkini upp í føroyskum politikki: Øðrumegin stendur ABC samgongan uttan visjónir, uttan mál og mið, burtursæð frá hesum eina at varðveita stabilitetin við einki at gera – her valdar politiskt vakuum. Hinumegin stendur Tjóðveldi við sínum visjónum um einar Føroyar, har føroyingar skipa seg sum sjálvstøðuga tjóð til tess at taka beinleiðis lut í øllum altjóða samstarvi og taka ábyrgd av okkara búskapi.

Formaðurin eftirlýsir nýggjari tjóðskaparrørslu, samstundis sum hann sigur liberlismuni farvæl við at staðfesta, at tær politisku skipaninar, sum skuldu gera framtíðartryggar loysnir fyri komandi ættarlið, hava gjørt beint tvørturímóti. Neoliberala hugsjónargóðsið verður avsagt og okkara niðurstøða má vera, at Tjóðveldi nú er komið aftur á ta greiða vinstrahallu kós, sum eyðkendi flokkin á ungum árum. Hetta er áhugavert. Lagt kann tó verða afturat: Fyrr var illa, tí í dag eru flestallir politikkarar í Europa, antiliberalistar. Vert er at hava í huga, at óvikiliga vinstrahalla kósin kostaði flokkinum undirtøku undir kalda krígnum. Áhugvert hvussu hendan nýggja kósin á politiskt bakborð fer at gagnast veljaranum og ikki minst sera borgarligu og konservativu flokkunum á sjálvstýrisvonginum, sum Tjóðveldi javnt og samt fríggjar til.

Sum nevnt verða eisini ítøkilig mál sett út í politiska kortið. Vælferð og samhaldsfestið og ein flyting av skattabyrðunum frá lønarinntøkum til nýtslu- og umhvørvisgjøld, fiskivinnupolitikkur við fiskidagabanka og virðing fyri lívfrøðiligum tilráðingum, umhvørvi og orka, mentan og uttanríkispolitikkur eru raðfestu økini. Nøkur øki eru samanfallandi við raðfestingar hjá øðrum flokkum – onnur eru serstøk tjóðveldismál. Samantikið: sera áhugaverdar útmeldingar úr gomlu javnaðarháborgini Skálavík.

**Sosialurin**

## Javnaðarflokkurin tekur undir við Johan Dahl

TÍÐINDASKRIV
*Javnaðarflokkurin*

Javnaðarflokkurin helt í gjárkvøldið floksleiðslufund í Losjuni í Havn. Viðgjørd varð politiska støðan og tær ætlanir, sum samgongan og serliga umboðini hjá flokkinum í landsstýrinum arbeiða við.

Flokkurin staðfestir, at tað er neyðugt at vera á varðhaldi, nú fíggjarligu umstøðurnar eru trengri, soleiðis at grundleggjandi tænasturnar í samfelagnum ikki verða ov hart lagdar undir trýst.

Floksleiðslan fegnaðist um, at flokkurin saman við samgonguni hevur funnið loysnir, serliga á trupulleikunum rundan um játtanina til Børn og ung, soleiðis at tilboðini til barnafamiljurnar ikki gerast verri. Somuleiðis fegnaðist floksleiðslan um, at eykajáttanin, sum er ávegis, loysir trupulleikarnar á mentunarøkinum, umframt at samtykta íløguætlanin nú eisini verður endurskoðað.

Floksleiðslan tekur undir við ting- og landsstýrismanningini í spurninginum um at hækka talið á nevndarlimum í Atlantsflog og stuðlar tí landsstýrismanninum í vinnumálum í hansara ætlanum.

Enn einaferð boðar flokkurin frá, at tað kann als ikki góðtakast, at svartkjaftakvota verður latin skipum, sum ikki hava møguleika at veiða svartkjaft.

Á fundinum greiddi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá sínum ætlanum við einari umskipan av Húsalánsgrunninum, soleiðis at lán kunnu verða givin til orkusparandi tiltøk hjá bæði pensionistum og øðrum sethúsaeigarum. Flokkurin gav sín fulla stuðul til byrjanina av hesum grøna vakstrarpakka, sum ætlanin nú verður nevnd.

## Sjálvstýrisfeløg lagt saman

TÍÐINDASKRIV
*Streymoyar Sjálvstýrisfelag á Grækarismessu 2009*

Á árliga grækarismessufundinum samtykti felagið at leggja Streymoynna saman í eitt felag – Streymoyar Sjálvstýrisfelag.

Felagið heldur, at sitandi landsstýrissamgonga er óarbeiðsfør, og spurningurin bert er um tíð, so fer l henda søkkandi skúta at renna á land.

Felagið hevði tí eisini uppstillingarfund, har verandi valevni vórðu staðfest og tvey nýggj fólk stillaði upp til komandi løgtingsval: Nýggj valevni til løgtingsval eru nú

- Sigrún Mohr, pharmakonom og felagsformaður í Tórshavn.
- Annfinnur Garðalíð, bóndi og skipari í Vestmanna.

Sigrún Mohr er kend sum formaður í Alzheimerfelagnum (www.alzheimer.fo, har hon í mong ár hevur virkað fyri korunum hjá teimum, ið rakt vera av demensi, eins og umstøðunum annars hjá eldri fólki í samfelag okkara.

Sigrún Mohr stillaði á fyrsta sinni upp til val á seinasta kommunuvali, tá ið hon fekk 314 persónligar atkvøður – fleiri atkvøður enn meirilutin av sitandi býráði. Valskipanin gjørdi, at hon kortini ikki varð vald, men eftir ótaldar óheitanir er Sigrún nú vorðin løgtingsvalevni.

Annfinnur Garðalíð er kendur sum sjómaður og skipari, sum seinastu árini hevur roynt við gørnum. Hjartamál hansara eru broytingar í fiskivinnuni, so vit fáa skilabetri og burðardyggari veiði. Sum bóndi er Annfinnur kendur við viðurskiftini hjá smærri jarðarbrúkarum og felagshøgum, hvørs kor Sjálvstýrisflokkurin áhaldandi hevur roynt at bøtt.

Annfinnur Garðalíð hevur ikki áður stillað upp, men er longu farin undir at agitera. Nú Føroyar eru eitt valdømi ber til hjá valevnum flokisins í Norðstreymi at gera seg galdandi millum samsint í øllum landinum, so hesin bústólpi fer helst at fáa góðan túr.

Streymoyar Sjálvstýrisfelag metir seg við hesum báðum valevnum at hava fingið sera týðandi profilar til løgtingsvalið komandi – ið ikki man vera so langt burturi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.